UTTAN ÚR HEIMI

Eiga at umhugsa tiltøk ímóti Ísrael

Torbjørn Jagland: - Í tólv ár hevur Irak liðið undir revsitiltøkum og er nú rakt av kríggi, tí USA heldur, at iarakar gera ikki eftir samtyktunum hjá ST. Harafturímóti er Ísrael sloppið undan tílíkum tiltøkum, sjálvt um landið hevur brotið ST-samtyktirnar um at taka seg aftur av teimum hersettu økjunum á Vestara Áarbakka, í Gaza-geiranum og á Golan-herunum.

-Tað er dupultmoralur at seta revsa Irak við tiltøkum, men ikki Ísrael, heldur fyrrverandi norski forsætissráðharrin, Torbjørn Jagland, sum nú er formaður í uttanríkispolitisku nevndini hjá Stórtinginum.

MIÐEYSTUR
Árni Joensen

- At lond gera av at fara í kríggj við Irak fyri at fáa eitt annað stýri í landinum, men einki gera fyri at skipa eitt palestinskt ríki fer bert at gera vreiðina uppaftur størri, sigur Torbjørn Jagland, sum heldur, at ST eigur at leggja uppí fyri at noyða Ísrael at halda gjørdar samtyktir.

- Eg veit væl, at hetta er eitt eymt mál, men eftir mínari hugsan áttu tær samtyktirnar, sum galda ísraelsmenn og palestinar, at verið lagdar undir grein sjey í ST-sáttmálanum, soleiðis at tiltøk kunnu koma upp á tal. Á tann hátt hevði trygdarráðið fingið møguleikan at sett í verk tiltøk, sum kundu gjørt enda á hersetingini og fingið eit palestinskt ríki skipað, sigur hann.

Torbjørn Jagland vísir á, at seinastu tólv árini hevur Irak liðið undir búskaparligum revsitiltøkum, og nú er landið rakt av kríggið, tí USA heldur ikki, at irakar gera eftir samtyktunum hjá ST. Harafturímóti er Ísrael sloppið undan tílíkum tiltøkum, sjálvt um landið hevur brotið ST-samtyktirnar, sum hava álagt landinum at taka seg aftur av teimum hersettu økjunum á Vestara Áarbakka, í Gaza-geiranum og á Golan-herunum.

- Eg legði til merkis, at bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, herfyri segði, at Vesturheimurin hevur havt eina dupultmoralska hugsan, tá tað snýr seg um Miðeystur. Eg eri samdur við honum í, og vit mugu gera nakað við hetta. Vit mugu javnseta ST-samtyktirnar um Ísrael og palestinararnar við samtyktirnar um Irak, sigur Torbjørn Jagland.

Hann sigur, at á tann hátt hevði Vesturheimurin sloppið undan skuldsetingum um, at hann ger mun á, hvat land tað snýr seg um, og at Vesturheimurin ikki vendir sær ímóti muslimunum, men roynir at skapa frið í frælsi í økinum.

- Men hetta letur seg ikki gera uttan at loysa tann palestinska spurningin. Hann úlmar alla tíðina, og hann er ein meginorsøk til ein stóran part av yvirganginum, sum vit hava sæð. Tí arabarar og palestinar kenna tað, sum at Vesturheimurin ger mun á Ísrael og arabisku londunum. Í teimum fátæku palestinsku flóttafólkalegunum, har fólk eru statsleys og eingi rættindi hava, veksur vreiðin um hendan dupultmoral.

- Amerikanarar halda kanska, at teirra makt kann ræða muslimarnar. Eg vænti, at úrslitið sum frá liður verður tað øvugta, og at vreiðin fer at veksa. Serstakliga tí einki verður gjørt fyri at loysa ta ósemjuna, sum úlmar niðri undir alla tíðina, nevnliga ósemjan millum ísraelsmenn og palestinar, sigur Torbjørn Jagland við norska útvarpið.

Mæla til fleiri krossferðir

Í Washington verður vanliga sagt, at vilt tú vita, hvat amerikanska stjórnin ætlar og fyrireikar, skalt tú lesa vikublaðið Weekly Standard. Er hetta eftirfarandi, er Irak ikki tað einasta amerikanska málið í Miðeystri.

Árni Joensen

Síðani 1997 hevur Weekly Standard roynt at eggja til eitt amerikanskt hernaðarátak ímóti Irak. Nú kríggið ímóti Saddam Hussein nærkast endanum, mælir blaðstjórin, Fred Barnes, Hvítu Húsunum frá at steðga á.

Forsetin og menn hansara eiga at nýta tann sálarfrøðiliga aldukambin, sum USA ríður á í løtuni, til at leggja trýst á onnur lond í sambandi við yvirgang og hópoyðingarvápn, skrivar blaðstjórin. Sum eitt dømi nevnir hann Sýrialand.

Eyðkennið hjá nógvum av teimum sonevndu nýkonservativu amerikananunum er, at teir krevja ein meiri virknan amerikanskan uttanríkispolitikk. Hann skal bera bráð av konservativum virðum, men skal ikki aftra seg við at bjóða tí skipaða heiminum av. USA skal við sínari sterku hermegi verða einaráðandi á Jørðini. Tað er sambært teimum nýkonservativu eisini tað besta fyri allar partar, tí í veruleikanum vilja øll fegin ættleiða ta amerikansku heimsáskoðanina, siga teir.

"Fær til hús, ST"

At verja Ísrael er eitt av meginmálunum hjá teimum nýkonservativu. Varastjórin á tíðindadeildini hjá Weekly Standard, Victorino Matus, sigur, at nógv fólk siga blaðið vera likudistiskt og sipa við tí til Likud-flokkin hjá ísraelska forsætisráðharranum, Ariel Sharon.

- Nógvir av teimum nýkonservativu eru jødar og trúgva upp á hugsjónina um eitt jødiskt heimland, sigur hann.

- Vit taka undir við kríggnum í Irak, ikki júst tí at landið er ein álvarssom hóttan ímóti friðinum í økinum, men heldur tí at fólkið har hevur liðið undir einum harðrendum stýri. Vit fara at bera so í bandi, at Bush-stjórnin heldur fram við sínari verkætlan, eftir at sjálvt kríggið er liðugt, sigur Victorino Matus.

Weekly Standard er ímóti, at ST skal leggja seg útí, hvussu Irak verður skipað og rikið aftan á kríggið. Nú um dagarnar hevði blaðið eina grein við yvirskrivtini "ST, fær til hús", og í greinini varð heimsfelagsskapurin mettur sum ein hóttan fyri ætlanina at skipa Irak sum eitt vælvirkandi samfelag, ið skal byggja á tey røttu moralsku grundvirðini.

- Vit royna at fáa fólk at skilja, hvussu fólk í Miðeystri hugsa. Har hevur styrki størri viðurkenning enn veikleiki. Í okkara eygum er Ísrael er lýsandi dømi um demokrati í økinum, sigur Matus.

Stuðul frá Murdoch

William Kristol hevur verið drívmegin aftan fyri Weekly Standard, síðani blaðið kom út á fyrsta sinni miðskeiðis í nítiárunum. Hann fór undir útgávuna, tí hann helt tað vera neyðugt, at teir nýkonservativu fingu sítt egna blað heldur enn at halda seg til tað gamla konservativa National Review. Saman við einum øðrum stigtakara vendi hann sær til avstralska fjølmiðlakongin Robert Murdoch og bað hann um hjálp Tað sigst, at Murduch læt stigtakarunum smáar 30 milliónir krónur uttan at seta blaðnum stórvegis treytir. Hetta seinasta var kanska heldur ikki so løgið, tí Murdoch var samsintur við teimum nýkonservativu.

Tað er einki at taka seg aftur í, at teir, sum skriva Weekly Standard, eru hegnismenn við penninum. Í hvussu er ein teirra, Robert Kagan, vakti ans í Evropa í fjør, tá hann í einari grein lýsti USA og Evropa sum tveir heimspartar, sum í veruleikanum áttu at verið á hvør sínari gongustjørnu. Í hansara eygum er Evropa tann lagaliga og varisliga Venus, meðan USA er tann viljasterki og stríðshugaði Mars.

Gongur við fullari ferð hjá Guðruni

Hon hevur fleiri konsertir um dagin og fríggjadagin var hon við til at savna yvir 40 milliónir inn til offrini fyri krígnum í Irak

Tað hevur gingið við fullari ferð hjá Guðruni, síðani hon fór aftur til Danmarkar og hon heldur einar tríggjar, fýra konsertir um dagin. Men í næsta mánað kemur hon til Føroya at hava tvær konsertir.

STJØRNUSKOT
Áki Bertholdsen

Tað gongur við fullari ferð hjá Gurðun Jacobsen.

Eftir at hon fór aftur til Danmarkar hósdagin, hevur hon verið á konsertferð runt um í Danmark.

Og danir hava rættiliga tikið hana til sín, tí allastaðni er stúgvandi fult av fólki. Onkustaðni hava tað verið eru upp ímóti 5.000 fólkum og lurta.

Tey fáa eisini ein hóp av ummælum, og tað er næstan ikki dagur, at ikki okkurt blað skrivar um tey.

Men umrøðurnar hevur Guðrun ikki lisið sjálv.

– Eg havi ikki tíð at lesa bløðini, men onkur er, sum savnar alt saman so vit seinni fáa lisið alt tað, sum bløðini hava skrivað.

Hon er á hesi konsertferðini saman við teimum sum blivu nummar tvey og trý í Stjerne for en aften og fagnaðurin er stórur allastaðni har tey koma.

Men alt gongur so skjótt fyri seg, at tað gongur nóg illa at sansa hvar tey eru. Í hvussu so er mintist hon ikki, hvussu øll plássini nevndist, sum tey høvdu sungið í og hon hevði heldur ikki fingið við, hvar næsti steðgur skuldi vera.

Men hetta er so fyrimunurin við at hava onkran, sum leggur alt til rættis so tann partin av ferðini nýtist teimum als ikki at hugsa um.

– Eg fylgi bara við, sigur hon.

Tá ið vit hittu hana á máli á miðdegi týsdagin, sótu tey øll í einum bussi á veg á næstu konsertina. Men, hvar hon skuldi vera, hevði hon ikki fingið við.

Hóast tað er strævið, har onkuntíð tríggjar ella fýra konsertir eru á skránni í dagin, stórtrívist Guðrun í hesum lívinum.

Føldist gott

Fríggjakvøldið var eitt serligt upplivilsi, tí tá var hon við í arbeiðnum at savna yvir 40 milliónir inn til offrini fyri krígnum í Irak.

– Tað føldist øgiliga gott. Tað føldist gott at vera við í einum góðum tiltaki og tað var eisini øgiliga gott at standa á palli aftur í Forum. Men tað var øðrvísi enn á finaluni í Stjerne for en aften, tí hesuferð vóru ongi føroysk fløgg at síggja og tað var nú eitt heilt serligt upplivilsi at síggja øll tey føroysku fløggini og at vita sær, at tað vóru so nógvir føroyingar til staðar.

Men tað skerst ikki burtur, at í Forum hetta kvøldið var hon í finum selskapi, tí har vóru nøkur av størstu nøvnunum í donskum tónleiki. Nevnast kunnu soleiðis hissini, Sort Sol, Brødirnir Olsen, Sanne Salomonsen, Savage Rose og onnur.

– Tað var eitt sindur undarligt hjá mær at vera í stovu saman við øllum hesum kanónunum og eg føldi meg eitt sindur lítla í fyrstuni. Men tað gekk ikki so leingi, so kom eg at práta við fleiri av teimum og tey vóru virkuliga fitt fólk, so tað var skjótt at eg fekk tað nógv betri.

Ein serligan tokka hevur Guðrun fingið til Sanne Salomonsen.

– Hon er eitt fantastiskt menniskja. Hon segði við meg, at eg hevði eg brúk fyri góðum ráðum, ella fyri onkrum at tosa, skuldi eg altid verða hjartaliga vælkomin at tosa við hana, tí hon skuldi hjálpa mær alt hon kundi.

– Sanne Salomonsen er sanniliga ikki hvør sum helst, so tað var stórt at fáa at vita. Hon hevur fingist við tónleik í eitt mannaminni, so hon kann skjótt blíva hent í ávikum, sigur Guðrun.

Men hon hitti eisini Olsen-Brødurnar, onkran í Eye Q, Sashu Dupont og onnur og tey vóru øll fitt og løtt at práta við.

Fríggjadagin fer hon til Malta at ferðast í átta dagar og tað var ein partur av vinninginum.

Ikki nervøs

Tey, sum hava sæð Guðruna í sónvarpi hava lagt til merkis, hvussu rólig hon er. Hóast hon bara er 20 ára gomul, er hon still og sáttlig og svarar skilagott og umhugsað uppá teir spurningar hon fær og tykist ikki serliga nervað av øllum hóvastákinum.

Vit spurdu hana, um hon als ikki er nervøs.

– Ikki fyri at syngja fyri áhoyrarum. Men tað er eitt sindur verri, tá ið eg skal tosa nógv, tí tað liggur ikki til mín. Eg var heilt oyði-

Framhald á síðu 11



Navision Attain
Special Edition

Formula.fo bjóðar nú ta vælumtóktu bókhaldsskipanina Navision Attain til tær miðalstóru smærru fyrirtøkurnar

Ein pakki er samansettur av øllum teimum vanligastu modulunum. Hesin pakki verður nevndur "Special Edition". Men tað er serliga prísurin sum er "special", tí hann er einans 50% av vanliga prísinum fyri hesi modul. Annars er einasta avmarking, at skipanin haegst kann útbyggjast til 10 samstundis brúkarar.

Um fyritøkan hevur eittfortíð frá Navision, ber eisini til at dagføra hesa skipan til Special Edition, við teimum rættindum, sum fyritøkan annars hevur.

Vísir tað seg, at skipanin er ov lítil, ber til at dagføra til eina fulla version av Navision Attain og fáa ilagurna afturrindaða. Fer dagføringin fram innan 12 mánaðir, er afturkeypsvirðið 100%, eftir hetta tíðarskeið er afturkeypsvirðið 75% av licensvirðinum.

Pakkin inniheldur hesi modul:

- Figgjarskipan basis
- Figgjarætlan
- Debitor
- Sølufakturering
- Prísáseting
- Kreditor
- Keypsfakturering
- Goymsla
- Alternativir søluprísir
- Við o.a. pakkanum eru rettindi til um brúkara og um sølustaðir

Tilboðið er galdandi til 16. juni 2003.

Um áhugi er fyri tilboðnum, ella eru spurningar annars, ber til at ringja til okkara og fáa fleiri upplýsingar á telefon 344000 ella við at senda ein teldupost til navision@formula.fo.

NAVISION SolutionCenter

formula.fo
Tel: 344000 • www.formula.fo • navision@formula.fo